# Kaffiprát skapti nýggja vøru

**Virkið Looknorth í Klaksvík er farið undir at framleiða serligar stólpar til saltfiskaeskjur. Hugskotið næstan av tilvild í kaffipráti, men síðani hevur Looknorth arbeitt miðvíst við at menna nýggja stólpan**

FRAMLEIÐSLA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Nýggi stólpin hjá Looknorth skal styrkja pappeskjurnar, sum saltfiskur verður sendur av landinum í. Tað hevur kosta hálva triðju millión krónur at útvikla stólpan*

Virkið Looknorth, sum higartil hevur framleitt kassar til alivinnuna, er nú farið undir eina nýggja framleiðslu til fiskivinnuna. Virkið leitar í løtuni eftir nýggjum framleiðslum, tí alivinnan í Føroyum steðgar mest sum heilt tíðliga næsta ár.

– Tí er tað umráðandi fyri okkum, at vit kunnu skapa nakrar nýggjar vørur, tí annars kann felagið hjá okkum yvirliva, sigur Árni Skaale, stjóri á Looknorth.

Og tann fyrsta nýggja vøran er nú blivin veruleiki. Looknorth framleiðir vørur úr plasti, og nýggja átakið er ein stólpti til saltfiskaeskjur.

Føroyskur útflutningur av saltfiski fer vanliga fram í 500 kilo pappeskjum, og nýggi stólpin skal bæði styrkja hesar eskjur og gera tað møguligt at stápla tveir plattar omaná hvørjum øðrum. Hetta skal hava við sær, at útflutningsfyritøkurnar kunu spara í flutningi og ikki fáa reklamatiónir, tí eskjurnar eru skaddar.

### Hugskot

Tað var næstan av tilvild, at stjórin í Looknorth kom fram á hugskotið við stólpunum. Tað var í kaffipráti við saltfiskamenn, at teir fóru at tosa um eskjurnar og stólparnar, sum teir ikki høvdu at brúka.

– Vanligt hevur verið at gjørt okkurt træ ella okkurt rør til hesar eskjur, men tað er nógv stríð av hesum, og tað er ikki matvørugóðkent. Nú hava vit gjørt ein nýggjan stólpa úr plasti, sum lættur at fáast við, og sum er matvørugókendur, sigur Árni Skaale.

Fyrr í ár framleiddi Looknorth fleiri túsund stólpar sum eina roynd til tvey virki í Klaksvík. Annað virkið upplivdi at stólparnir brotnaðu undir flutningi, meðan hitt virkið einki merkti til hetta við sínum 5000 stólpum.

– Vit hava síðani arbeitt við at styrkja stólparnar, og vit hava gjørt fleiri royndir. Nú er stólpin nógv sterkari enn hann var, og hann er væl egnaður til hesar eskjurnar, sigur stjórin á Looknorth.

### Kostar at menna

Looknorth hevur brúka hálva triðju millión krónur til at menna nýggja stólpan. Fyrst var ein nýggj maskina keypt, sum kann framleiða slíka vøru, og síðani eru eisini nógvar hundrað túsund krónur nýttar til at fáa júst tað rætta skapið og røttu styrkini á stólpanum.

– Hetta hevur tikið tíð og hevur kostað nógvar pengar, men nú eru vit til reiðar at bjóða fiskivinnuni stólparnar, sigur Árni Skaale.

Looknorth hevur sjálvt lagt meginpartin av pengunum í nýggju vøruna, men eisini oljufelagið BP hevur stuðlað menningini.

Looknorth hevur framleitt kassar síðani februar mánað í 2001, og seks fólk arbeiða á virkinum, sum heldur til á vestara kaiøkinum í Klaksvík.

## Jól í sparikassanum

Eins og undanfarin ár fer Norðoya Sparikassi at skipa fyri jólahugna uttan fyri stovnin við Ósávegin. Á skránni verður tónleikur av ymsum slagi, tey vitjandi fáa kaffi og køkur og eisini verður okkurt gott til børnini. Peningastovnurin hevur latið teimum børnunum, ið tøma Silva í jólamánaðinum ein Silva kalendara og eitt jólakort. Hetta jólakortið er ein lutaseðil um nakrar Silva vinningar, sum verða drignir til hesi uttandura tiltøkini.

Sum vanligt kemur tónleikurin at ganga fyri seg á pallinum hjá Sparikassanum.

Hesi tiltøkini verða teir tríggjar komandi hósdagarnar undan jólunum. Fríggjadagin 17. desember verður so skipað fyri einum líknandi tiltaki utann fyri deildina hjá Sparikassanum í Leirvík. Fyrsta tiltakið verður í dag frá klokkan 17 til 18.

**- sae -**



## Læknamiðstøðin liðug

Fríggjadagin 17. desember verður kommunulæknamiðstøðin í Klaksvík tikin í nýtslu. Klaksvíkar kommuna hevur sent innbjóðingarnar til móttøku í læknamiðstøðini út, og verður hon klokkan 15 fríggjadagin 17. desember.

Í nýggju læknamiðstøðini verða fyri fyrstu ferð í Norðoyggjum fýra fult útgjørd kommunulæknahøli undir sama taki. Kommunan vónar, at hetta verður viðvirkandi til eina nýggja tíð við støðugum kommunulæknaviðurskiftum í Klaksvík, har bert tað eina av teimum fýra føstu kommunulæknastørvunum eru mannað, sum nú er. Tvey onnur størv eru mannað við avloysarum, og tað fjórða er ikki sett. Henda bygging er á ein hátt søgulig, tí umframt byggiharran í Klaksvíkar kommunu hava eisini grannakommunur í Norðoyggjum luttikið fíggjarliga í hesi íløguni, sum jú kemur øllum Norðoya Læknadømi tilgóðar.

**- sae –**

merko JÓLAKALENDARIN

*Hósdagur 9. desember 2004*

*MERRILD kaffi 103*
*500 gram*
*14,95*



*EURO SHOPPER*
*pasta*
*skrúvur*
*500 gram*
*tak 5 fyri*
*20,00*



*DANISH PRIME*
*døgurðakjøtbollar*
*1 kg.*
*39,95*



merko merko merko



SPURNINGUR
Hvussu eitur landstýrismaðurin í fiskivinnumálum ?

Tilboðið er bert galdandi hósdagin 9. desember

Drigið verður 29. des. millum allar innkomnar seðlar í jólamánaðinum. Vinningurin er ein Apex ferðaseðil til Danmarkar (aftur og fram) íroknað ferðaavgjald.
Seðilin kann avleverast við kassan í einum av MERKO handlunum

SVAR

NAVN & TELEFON NUMMAR